Fylgiskjal 2

Fiskivinnuráðið

Fundur 2021/02

Tikið úr frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum mánadagin 18. januar 2021 kl. 16.00-17.30

Møtt:
Jóanna Djurhuus, formaður
Jan Højgaard, Føroya Fiskimannafelag
Stefan í Skorini, Føroya Reiðarafelag
Jógvan Hansen, Føroya Ráfiskakeyparafelagið
Jóhannus Martin Olsen, Føroya Ráfiskaseljarafelag
Finnbjørn Vang, Meginfelag Útróðrarmanna
Jastrid Wolles Niclasen, fyri feløgini hjá arbeiðsfólki á fiskavirkjum
Annfinnur Garðalíð, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Skrá:

> Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Heimild hjá landsstýrismanninum at krevja rættindahavarar eftir upplýsingum og at taka veiðirættindi aftur, strika treytina um veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við ávíst slag av vinnuligum royndum og verkætlanum ávikavist fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir).

Dagsskráin góðkend.

Ad. 3
Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Heimild hjá landsstýrismanninum at krevja rættindahavarar eftir upplýsingum og at taka veiðirættindi aftur, strika treytina um veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við ávíst slag av vinnuligum royndum og verkætlanum ávikavist fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir).

Umboðið fyri Reiðarafelagið og umboðini fyri manningarfeløgini mæla frá at linka treytirnar um veiðiloyvi, tá ið søkt verður um kvotur til vinnuliga royndir og verkætlanir og royndarfiskiskap sbrt. §§49-50. Víst verður á, at landsstýrismaðurin í verandi lóg longu hevur møguleika at veita undantak frá kravinum um veiðiloyvi í báðum førum, og hetta verður mett nóg mikið.
Víst verður til hoyringarskriv, sum verða send Fiskimálaráðnum.

Fundarfrásøgn lisin og góðkend.

Fundur lokin kl. 17.30

Jóanna Djurhuus, formaður Jákup Mørkøre, skrivari